# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 30.09.2025 |
| Mál nr.: | 24/22544 |
| Málsviðgjørt: | JEK, DH, BAB |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 18.09.2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)**
(mvg frítøka fyri epli, grønmeti og barnablæur og broyttar mvg-reglur fyri brúktar leigubilar-fylgilógaruppskot til FLU 2026)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 7. mars 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 10, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Fyri motorakfør, sum eru skrásett sum leiguakfør, har meirvirðisgjald ikki er fakturerað til endabrúkaran, skulu virki við sølu av motorakførunum avgjaldsavgreiða hesi eftir søluprísinum frádrigið ein prosentpart av skrásetingargjaldinum. Prosentparturin er 90% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett minni enn 1 ár. Prosentparturin lækkar síðani við 10 prosentstigum árliga inntil hann er 0% prosentstig 10. árið. Fyri motorakfør, nýtt til skúlakoyring, kann reglan í stk. 1 verða nýtt, um so er, at akfarið hevur verið nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir.”

**2.** Í § 12, stk. 1verður sum litra u sett:
“u) Sølu av eplum og grønmeti, ið koma undir vørunumrini 0701.10.00 til og við 0714.90.90 og av blæum til børn, ið koma undir vørunumrini 9619.00.50 og 9619.00.81.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Samgongan ynskir at lækka prísin á gerandisvørunum eplum, grønmeti og blæum. Metingin er, at átøkini fara at kosta landskassanum um 22 mió. kr. at fremja.

Við uppskotinum verður lagt upp til, at ávísar gerandisvørur verða frítiknar fyri meirvirðisgjald.

Talan er um hesar vørur:

- *Epli og grønmeti*
- *Blæur til børn*

Eisini er í uppskotinum lagt upp til, at broyta mvg frádráttin fyri leigubilar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu er søla av eplum, grønmeti, undir hesum frystum grønmeti, og blæum til børn, meirvirðisgjalds skyldug.

Sambært galdandi lóggávu kann seljari av leigubili draga 60.000 kr. frá í sambandi við sølu av leigubili.

Við keypi av nýggjum bili skal einki mvg rindast av skrásetingargjaldinum. Endamálið við frádráttinum er at tryggja, at mvg ikki verður rindað av skrásetingargjaldinum. Tí gevur tað meining at veita ein frádrátt í mvg-grundarlagnum. Verandi frádráttur er tó so mikið stórur, at fyri ein miðal dýran bil virkar verandi frádráttur sum ein stuðul til bilasølurnar á umleið 40.000 kr.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at lætta um gerandisdagin og at javnstilla sølu av leigubilum við aðrar brúktbilasølu, t.d. at innflyta brúktar bilar.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða ávísar gerandisvørur frítiknar fyri sølumeirvirðisgjald fyri at lætta um gerandisdagin, og mvg frádrátturin í sambandi við sølu av leigubili verður broyttur.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið fevnir um tvær broytingar í meirvirðisgjaldslógini.

*Broyting 1. MVG frádráttur av sølu av leigubili verður broyttur*

Tað verða um 400-450 leigubilar seldir árliga. Tá ið ein leigubilur verður seldur, verða upp til 60.000 kr. drignar frá í MVG'num (sí dømi 2). Broytingin hevur við sær, at frádrátturin verður strikaður. Í staðin skal seljarin rokna MVG av einum lækkaðum søluprísi. Lækkingin kann vera upp til 90% av skrásetingargjaldinum (dømi 3). Í roknaða døminum er munurin í MVG 44.250 kr. (dømi 4).

Fíggjarmálaráðið metir, at munurin í MVG fyri hvønn bil er um 40.000 kr. Mett verður, at broytingin hevur við sær umleið 15 mió. kr. í meira inntøku av MVG.

Endamálið við uppskotinum er at rætta eitt marknaðarbrek, soleiðis at allir bilar rinda sama MVG. Sannlíkt hevur ein leigubilur størri virðistap enn vanligt, men tað er nakað, sum marknaðurin skal taka hædd fyri. Við uppskotinum er neyðugt hjá bilútleigarum at tillaga sítt virksemi, bæði hvat viðvíkur útleigan og víðarsølu av brúktum bili. Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar við sær fyri bilútleigarar, sum flyta bilarnar av aftur landinum, tá ið ferðaverstíðin er enda.

**Bilasøla og MVG**

| Dømi 1 vanlig søla av bili | |
|---|---|
| **Keyp** | |
| CIF virði | 150.000 kr |
| Virðisgjald (skrásetingargjald) | 87.500 kr |
| Onnur gjøld | 8.000 kr |
| Keypsvirði | 245.500 kr |
| **MVG uppgerð** | |
| CIF virði | 150.000 kr |
| Søluvinningur | 50.000 kr |
| MVG - grundarlag | 200.000 kr |
| MVG | 50.000 kr |
| **Søla** | |
| Søluprísur u. mvg (keypsvirði+søluvinning) | 295.500 kr |
| MVG (sambært MVG uppgerð) | 50.000 kr |
| Søluprísur v. mvg | 345.500 kr |

| Dømi 2 - søla av leigubili (1 ár) núverandi skipan | |
|---|---|
| Søluprísur við virðislækking (10%) v. mvg | 310.950 kr |
| MVG av søluprísinum | 62.190 kr |
| MVG frádráttur | 60.000 kr |
| SøluMVG | 2.190 kr |

| Dømi 3 - søla av leigubili (1 ár) nýggj skipan | |
|---|---|
| Søluprísur við virðislækking (10%) v. mvg | 310.950 kr |
| Frádráttur virðisgjaldinum (90%) | 78.750 kr |
| Søluprísur v. mvg - frádrigið 90% av virðisgjaldinum | 232.200 kr |
| SøluMVG | 46.440 kr |

| Dømi 4 - einfalt dømi (munurin millum dømini 3 og 2) | |
|---|---|
| Virðisgjald | 87.500 kr |
| Niðurskriving (10%) | 78.750 kr |
| MVG frádráttur | 60.000 kr |
| MVG av 78.750 | 15.750 kr |
| Munur millum gamla og nýggja skipan | 44.250 kr |

*Broyting 2. MVG frítøka av eplum, grønmeti og blæum til børn*

Vørunumrini 0701.10.00 til og við 0714.90.90 og vørunumrini 9619.00.50 og 9619.00.81 verða frítikin fyri at rinda MVG. Mett verður, at broytingin hevur við sær umleið 22 mió. kr. í minni inntøku av MVG.

| mió. kr. | Innflutningur | Bruttovinningur | Søluvirði | MVG 25% |
|---|---|---|---|---|
| Eplir og grønmeti (vørunummur 0701 til 0714) | 60 | 20 | 80 | 20 |
| Blæur til børn (vørunummur 9619.00.50 og 9619.00.81) | 6 | 3 | 9 | 2 |

*2024 tøl (avrundað)*

Innflutningurin av eplum og grønmeti er umleið 60 mió. kr. Av blæum til børn er innflutningurin umleið 6 mió. kr. Roknaði bruttovinningurin á eplum, grønmeti og barnablæum

eru leysligar metingar. Fyri eplir og grønmeti er hann mettur til 25%. Tað kann tykjast lágt, men tá er roknað við einum munandi spilli av eplum og grønmeti. Tað ger bruttovinningin lægri. Fyri barnablæur er bruttovinningurin leysliga mettur til 35%.

Mett verður, at báðar broytingarnar tilsamans hava við sær umleið 7 mió. kr. netto í minni inntøku av MVG.

Uppskotið er partur av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, sum skal halda skil á ymiskum MVG satsum á matvørum. Hetta fer eisini at merkja størri eftirlit hjá grannskoðarum við MVG uppgerðum. Øktir umsitingarkostnaðir fyri vinnuna kunnu somuleiðis minka um kappingina á marknaðinum.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri barnafamiljur.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) **Hoyvíkssáttmálan**

2) **Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Talan er um eitt skattauppskot.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
§ 10 er í galdandi meirvirðisgjaldslóg galdandi fyri øll motorakfør, sum eru skrásett sum leiguakfør v.m. Í uppskotinum verður skotið upp, at reglan í stk. 1 frameftir einans skal verða galdandi fyri nevndu akfør, um meirvirðisgjald áður er fakturerað til endabrúkara. Við endabrúkara er at skilja brúkari, ið ikki hevur rætt at draga inngangandi meirvirðisgjaldið frá. Motorakfør, har meirvirðisgjald ikki áður er fakturerað til endabrúkara, skulu við sølu avgjaldsavgreiðast eftir søluprísinum frádrigið eina upphædd, sum svarar til skrásetingargjaldið fyrstu ferð motorakfarið varð skrásett, tó lækkað við 10 prosentum fyri hvørt ár, akfarið hevur verið skrásett.

**Til § 1, nr. 2**
Eftir uppskotinum verður søla av eplum og grønmeti, ið kemur undir vørunumrini 0701.10.00 til og við 0714.90.90 og søla av blæum til børn, ið koma undir vørunumrini 9619.00.50 og 9619.00.81, frítikin fyri meirvirðisgjald.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur